


*Nr. 9* *30. apríl 2017* *77. árg.*

# Rita navn títt mær í hjarta

Krossurin hevur stóran leiklut í lívi okkara. Fyrst kunnu vit nevna, at krossin finna vit í øllum norðurlendsku fløggunum. Vit síggja hann hanga á vegginum í mongum heimum og onnur bera hann í eini ketu um hálsin. Og frá barnsbeini hava vit lært at biðja Faðir Vár og at signa okkum við tríggjar ferðir at rista kross fyri andlit og bróst bæði á morgni og kvøldi. Meðan vit vóru smá, var tað mamman ella pápin, ið gjørdi hetta, áðrenn vit um morgnarnar fóru út at spæla, og áðrenn vit løgdust um kvøldið.

Krossurin var ein verja móti øllum illum, eins og tað at nevna Jesus-navnið kundi fáa alt ilt at víkja frá okkum.

Lívið hjá forfedrunum var vandamikið, og tí livdu teir gerandisdagin nær Gudi. Teir sungu ein sjósálm á veg til útróðrar og ein á heimleiðini. Krossmerki var rist í vaðkallarnar í bátinum sum tekin um tað sama, at teir kendu eina verju í hesum merki. Teir nigu í tigandi bøn og signaðu seg, áðrenn teir fóru niður í bjørgini. Teir litu seg í Guds hendur og kendu seg tryggar.

Tá ið eplini vóru sett niður um várið, signaðu teir veltuna og bóðu Gud um at geva ávøkst.

Í katólska heiminum er tað ógvuliga vanligt at rista kross fyri sær. Har um leiðir síggja vit eisini fótbóltsspælarar gera tað, áðrenn teir fara á vøllin.

Í síni Lítlu Katekismus mælir Martin Luther øllum til at signa seg bæði morgun og kvøld. Í kirkjuni er krossurin ein fastur partur í gudstænastuni. Vit síggja, at krossteknið verður rist bæði fyri andlit og bróst á barninum, áðrenn tað verður

doypt, til vitnisburðar um, at tað skal tilhoyra hinum krossfesta og upprisna Harra Jesusi Kristi. Krossurin markerar bæði byrjan og enda í jarðarlívinum. Við ta opnu grøvina lýsir presturin ta aronitisku signingina yvir tann deyða og øll, sum har eru samankomin.

*Rita navn títt mær í hjarta,*
*Jesus kongur mín og Gud,*
*at ei sól, ei myrkur svarta*
*megna teg at máa út!*
*Hetta innsigl' á meg set:*
*Jesus mín úr Nasaret,*
*hann, ið krossin mátti bera,*
*mær til sálargagn skal vera.*

# Guds ríkis dyr

*Og tær kvinnurnar, sum vóru komnar við honum*
*úr Galilea, fylgdu eftir og tær sóu grøvina, og*
*hvussu likam hansara varð lagt. Luk. 23,50–56.*

Krossurin gjørdist mín himmalstigi, grøvin dyrnar inn í Guds ríki! Alt er øðrvísi, av tí at Vár Harra Jesus hevur verið her. Enntá grøvin er ikki hin sama. Grøvin er ikki longur hin óhugnaligi staðurin, har lívsdagar mansins enda. Nú er grøvin sum einar dyr inn á nýggjar leiðir, einar døkkar dyr, ið ganga inn í Guds æviga, ljósa himmal.

Steig frelsari okkara fyri okkara skyld ikki niður í gravardýpið, so høvdu vit staðið uttan vón við gravir okkara. Nú liggur einglabros yvir øllum grøvum, sum goyma dustið av Guds børnum.

Og einglabrosið sigur frá uppreisnar-kraftini og undrinum, um kærleikans vón fyri øll, sum av sonnum trúgva á tann frelsaran, sum er krossfestur, deyður og jarðaður og triðja dagin risin upp frá deyðum.

*t.* týddi.

---

Frelsan í Jesusi er vón okkara. Frelsan ER ikki EIN møguleiki, hon er møguleikin.

*e.c.* týddi.

# Jesu koma

Jørðin bløðir og skelvur. Menniskju, dýr og náttúra suffa og gráta. Tsunamir leika í. Eitt blóðugt mannahav aldar í teimum arabisku londunum. Hamas og Hizbolla hótta Ísrael við týning – og Iran við sínum kjarnorkuvápnum hóttir Ísrael við fullkomnari oyðing.

Fyri fyrstu ferð í heimssøguni er ein náttúruvanlukka av hasari støddini sum í Japan send beinleiðis í sjónvarpi. Skelkandi myndir rulla døgnið runt tvørtur um okkara sjónvarpsskíggja. Ásurin á jørðini hevur flutt seg 10 cm. Hvønn týdning man tað fáa fyri framtíðina?

Inn ímillum verða samrøður gjørdar við serfrøðingar, sum greiða frá teimum politisku og fíggjarligu avleiðingunum. Aðrir dugnaligir serfrøðingar siga okkum frá, hvussu jarðskjálvtar taka seg upp og nevna ein „gátuføran supermánað" og „El Nino" sum møguligar grundir til hesi ógvisligu náttúrufyribrigdi.

Eg siti her og staðfesti, at hóast allar serfrøðingar er verðin blind og óvitandi. Eg má geva Jesusi 100% rætt í hansara ávaring í Matt. 24,38–39:

„Tí at eins og tey í døgunum framman undan flóðini miklu ótu og drukku, giftust og giftu, líka til tann dagin, tá ið Nóa gekk inn í ørkina, og tey ongum skoyttu, fyrr enn flóðin mikla kom og tók tey øll burtur, soleiðis skal eisini koma menniskjusonarins verða." Í 2. Pæt. 2,5 stendur, at Nóa var meir enn ein bátabyggjari. Hann var eisini „rættferðarboðarin". So meðan hann bygdi, boðaði hann tað, sum koma skuldi; men tey trúðu tí ikki. Jesus sigur í Matt. 24,7, at „landskjálvti skal verða víða hvar".

Vit liva í tí síðsta av tí síðstu tíðini hjá hesi verð. Jesu afturkoma er sera nær. Men hvør nevnir tað? Er tað bara ein av serfrøðingunum, sum sigur, at allar hesar vanlukkur, sum hesi ár bólta inn yvir okkum, eru føðingarvekir, sum ganga undan Jesu komu? Nei, ikki ein. Teir eru klókir innan onnur øki, men fullkomiliga óvitandi um andaliga veruleikan, sum liggur aftan fyri tilburðirnar, sum henda í okkara tíð. Á Nóa døgum vistu tey einki, fyrr enn flóðin mikla kom og skræddi tey øll burtur. Soleiðis skal eisini verða, tá ið Menniskjusonurin kemur aftur.

Kirkjur og samkomur, verið ikki tigandi! Trúgvandi, setið ikki ljósið undir skeppumálið! Jesus hevur givið okkum boð um at vera vitnir um tað, sum øll tekin peika fram ímóti: JESUS KEMUR SKJÓTT!

Vanlukkur eru ræðuligar. Men størsta vanlukkan er hon, at tey flestu ikki vita, at vanlukkurnar eru verkir, sum koma undan Jesu skjótu komu. Vanlukkurnar eru tekin, tær eru verkir. Verkir koma undan føðing. Verðin stendur fyri einari føðing, sum er Jesu afturkoma. Hann kom, sum tað varð boðað frammanundan, fyrru ferð – og teknini í okkara tíð, verkirnir boða frá, at Jesus kemur aftur – ja, enntá ógvuliga skjótt.

*Effie Campbell* týddi.

---

Tað gongur ímóti viðhvørt; men vit eiga tað lyftið, at gøtan, sum tey rættvísu ganga, verður ljósari og ljósari. Orðt. 4,18. Umstøðurnar broytast; men Jesus er hin sami, so hygg ikki at umstøðunum, men upp á Jesus og set títt álit á hann. Hav fokus á Jesusi. Tá ið Pætur tók eyguni av Jesusi og fór at hyggja at umstøðunum, tók hann at søkka. Tað er sum at sørfa á aldunum, tú kemur út aftur hinumegin. Jesus er altíð har, hann ber gjøgnum stormin, og tú kemur sterkari út aftur.

*e.c.* týddi.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 30. apríl | Tekstur: | 1. Kong. 17,1-16; | bíbliuorð: | Luk. 1,37 |
| 7. mai | Tekstur: | 1.Kong. 18,17-39; | bíbliuorð: | 1. Kong 18, 39b |
| 14. mai | Tekstur | Dán. 1,18-20 og 3,1-30; | bíbliuorð | 2. Mós. 20,3 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 10* *14. mai 2017* *77. árg.*

# Ein gripur, sum ikki minkar

*Gerið tykkum pungar, sum ikki verða slitnir, ein skatt, sum ikki minkar, í himlinum, har sum tjóvur ikki kemur at, og ei heldur mølur etur upp. Luk. 12,33b–34.*

Onki gagn er í at hava ein holutan pengapung. Tú gert beinast í at bøta um holið sum skjótast. Allar-best er tó at keypa sær ein nýggjan. Men hvussu nýggjur og tættur hann enn er, hava vit ofta eina kenslu av, at tað kortini er hol á honum. Hvat blívur av øllum pengunum? Heldur ikki tykist dugur altíð at vera í at hava peningin standandi í bankanum. Tí tú heldur, at tað kanska eisini er hol á kontuni.

Skriftorðið her omanfyri skal minna okkum á, at til er ein skattur, sum ikki minkar. Tað er eitt stað, har ríkidømi ikki svinnur, og har tjóvar ikki bróta inn. Her verður sipað til skattin í himlinum. Tað er eitt ríkidømi, sum vit ikki fáa savnað okkum við at leggja doyðin á at spara. Tað er eitt ríkidømi, sum Gud gevur okkum, og sum hann ansar eftir fyri okkum.

Um tú skalt skaffa tær tað ríkidømið, mást tú gera íløgur í at leita til Guds og vilja hansara, taka ímóti frelsu hansara í Jesusi Kristi og í lívi og deyða seta lít tína til hansara, sum gav sjálvan seg fyri okkum. Hann gjørdist fátækur, fyri at vit skuldu gerast rík. Jesus gav lív sítt, fyri at vit skulu liva. Tað er skatturin í himlinum.

Um vit skaffa okkum tann skattin, fer hjarta okkara at vilja vera har, sum hann er. Persónsmenskan fer altíð at vera knýtt at ríkidømi okkara. Soleiðis er við teimum, sum eru upptikin av jørðiskum góðsi. Men hava vit skatt okkara í himlinum,

toyggja vit okkum ímóti tí ríkidøminum, sum vit hava har. Tí er tað so umráðandi, hvar vit hava skatt okkara, tí har hoyra vit til.

*Um eg átti alt, men ikki Jesus,*
*var tað so nóg nógv at líta á?*
*Kundi hjartalongsulin tá stillast*
*við teim lutum, sum skjótt enda fá?*
*Um eg átti alt, men ikki Jesus,*
*tá var deyðin lívsins síðsta mál!*
*Hvat er heimsins gleði mót at eiga*
*frið við Gud og frið í síni sál?*

# Okkurt, vit ikki skilja

Sagt verður frá einum ungum mann, ið las til prest, og sum var sera nærlagdur í lesnaðinum, men at sumt tóktist honum sera trupult. Hann kom ein dagin inn á gólvið hjá einum kendum Orðsins tænara og segði, at tað vóru nøkur ørindi í Bíbliuni, sum hann ikki skilti, men sum hann hugsaði nógv um. Presturin svaraði honum: „Lat meg geva tær hesi ráðini: Tú mást góðtaka, at Gud veit okkurt, sum tú ikki skilur.“

Tað var eitt gott svar. Er Gud veruliga Gud, so merkir tað, at hann er meira framúrskarandi og klókari enn vit eru. Hann hevur skapað stór undurverk og ófatiligar gátur í natúruni. Er tað ikki natúrligt, at tað kann vera nógv í Bíbliuni, sum vit enn ikki skilja.

Bíblian, Tann Heilaga Skriftin, sigur: *„Mikil er drottin vár og stórur í veldi, onki er mark fyri vísdómi hans.* (Sálm. 147,5).

*t.* týddi.

---

Visjon Norge: Í Guds ríki eru kvinnur og menn líka. Tað merkir, at tey eru líka í tænastuni, og kvinnur kunnu tí gott hava leiðandi størv har. Tað sigur Bíblian (Gal. 3,28), og vit mugu geva henni rætt. Í einum hjúnalagi er øðrvísi. Har er maðurin høvur konunnar. (1. Kor. 11,3).

*e.c.* týddi.

# Kongurin doyði fyri fólk sítt

Kristus doyði eisini sum ein kongur. Í kraft av kongliga embæti sínum var hann tann einasti, sum var skikkaður at frelsa ein fortaptan heim. Hevði Jesus Kristus verið okkurt minni enn tað, hann er, kundi hann ikki bøtt fyri syndir okkara. Væl vitandi, at vit ikki vóru før fyri at gjalda, gav Jesus sjálvan seg sum gjald fyri okkum.

Umleið 800 ár fyri Jesu føðing skrivar Jesaja profetur: *„Tí gevi eg honum mangar í lut, og hann skal fáa máttugar sum herfong, fyri tað at hann tømdi sál sína til deyða og varð taldur millum misgerðarmanna – hann sum bar syndina hjá mongum og bað fyri misgerðarmonnum.“ Jes.53,12.*

Hvørja størri tænastu kundi kongurin veita teknum sínum enn at fría teir frá allari skuld og gera teir til samarvingar í ríki sínum? Hann gav lív sítt og rindaði ovurstóru skuldina, sum vit stóðu í.

*Skálina beisku at botni hann tømdi,*
*okkara skuldarbræv kvittaði hann,*
*lívið læt dómarin fyri tey dømdu,*
*við sínum deyða hann lív okkum vann.*

# Okkurt at halda um

Beint eftir seinna heimsbardaga savnaðu sameindu hermenninir foreldraleys og svong børn í legur. Tey fingu ríkiligt av mati, klæðum og umsorgan, men tey høvdu ilt við at sovna um næturnar; tey vóru friðleys og óttafull.

Tá kom ein sálarfrøðingur við einum hugskoti. Tá ið børnini vóru farin til songar, fingu tey ein breyðbita í hondina. Um tey vildu hava meira mat, fingu tey, men hin breyðbitan skuldu tey bara halda í hondini. Tað undranarverda hendi, at friður kom á børnini, tá ið tey vistu, at tey høvdu eisini mat til morgindagin.

Sum eitt Guds barn hevur tú meira enn breyð at halda um, nevniliga lyftir í Bíbliuni um, at um tú heldur teg til trúnna á Kristus, hevur tú alt, tær tørvar í framtíðini. Í Bíbliuni lesa vit: *„Latum okkum halda óvikiliga fast við játtingina av vón okkara, tí at trúfastur er tann, sum fyrijáttanina hevur givið.*

*(Hebr. 10,23).*

# Hann hjálpir úr trongdum

Tey, sum koma til himmals, hvørjum munnu tey fara at verða upptikin av, tá ið tey koma hagar? Tað kunnu vit sjálvandi ikki vita – um vit ikki rokna við, at Gud hevur fortalt tað í Bíbliuni. Í Sálmi 107 verður sagt, at tey, sum eru komin fram til Guds ævigu gleði, takka og lovprísa Harranum fyri alt tað góða, sum hann gjørdi móti teimum, tá ið tey høvdu tað trupult. Tá ið tey vóru svong og tyst, fingu tey hjálp. Um tey viltust, upplivdu tey, at Gud vísti teimum veg. Tey gingu í myrkri og snávaðu, tey kundu kenna seg eyðmýkt av sorg og líðing. Harrin gav tey ikki upp.

Um tú vendir tonkum tínum móti Gudi og biður um hjálp, so hjálpir hann. Um tú skuldi verið so mótfallin, at tú rópar um hjálp, er hann líka nær. Ein orðing úr 107. Sálmi kemur fleiri ferðir fyri, og hon gevur eisini tær ein himmal yvir tí, sum liggur tungt á tær. *„Tey, sum tá í neyð síni heittu á Harran, og sum hann tá hjálpti úr trongdum“ Sálmur 107,13*.

---

Eg sóknaðist leingi eftir tí góða lívinum. Eg royndi alt innan tað alternativa; men einki kundi metta meg og gera meg nøgda, fyrr enn eg møtti Jesusi, mínum Frelsara og bjargingarmanni.

*e.c.* týddi.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 14. mai | Tekstur: | Dán. 1,18-20 og 3,1-10; | bíbliuorð: | 2. Mós. 20,3 |
| 21. mai | Tekstur: | Dán. 6,1-25; | bíbliuorð: | Dán. 6,27b |
| 28. mai | Tekstur: | Jóh.14,1-3 og Mark 16,19-20 og Matt. 24,30-31; | bíbliuorð: | Jóh.14,2a |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74